# Brúðarparið

## *XXXXX & XXXXX*

Lag: Land of hope and glory

***Piano – Syngið við stíli***



Brúdleypsklokkurnar ringja,
vit eru komin til fest,
og nú vilja vit syngja
kvøðu frá gesti til vert.
Sita bæði so fegin,
vøkur tey eru at sjá,
lýsir av andliti gleðin,
eymt er hvørt eygnabrá.
Parið ***XXXXX & XXXXX***
tey halda brúdleyp í dag.

***Forte – Andið djúpt og syngið harðari***

Vit tykkum ynskja av hjarta
eydnu á tykkara ferð,
vóna at framtíðin bjarta
ríku gleðina ber.
Varið væl um hvørt annað
hjúnabandinum í
tí tá skulu tit sanna,
lagnan gert ty – kkum blíð.

***Riten – Tempo eitt sindur niður***

Góðu ***XXXXX & XXXXX***
Vit halda brúdleyp í dag.

## Millumspæl

**Vit fara upp á stólin, taka fløggini úr posanum og royna floyturnar. Larmið!!!**
**Gerið klárt til eina ordiliga larmandi finalu!!!**
**Veittrið við fløggunum og syngið HART!!!**

Kom nú, latið oss heiðra!
Kom nú, syngið øll við!
Kom nú, lat okkum feiðra
Parið við okkar' lið.
Syng nú við, so tey minnast
Aftur á hendan dag!

**Forrtissimo**
**Lat okkum hoyra hvør klárar teir høgu tónarnar!!**
**Tenorar og sopranar, koyrið nú á!!**

Lat okkum ynskja tillukku!
Ró – pið eitt trífalt hur – rá!
Fyri ***XXXXX & XXXXX***
Tey halda brúdleyp í dag.

**Klappið, blásið í floytur, brestið posarnar. LARMIÐ!!!**
**Veittrið við fløggunum og rópið eitt trífalt HURRÁ!**